

# Armgarð Arge, útvarpskvinna

*Hvussu fert tú at halda jól í ár?*
Vit eru nú fimm her í húsinum, og vit eru boðin jólaaftan til elstu dóttrina og hennara húski Hinar dagarnar hava vit gestir ella vitja familju. Triðja jóladag hittast trý húski her í gøtuni til ein nátturða. Vit eru um 30 børn og vaksin. Vit hava gjørt hetta hvørt ár í skjótt 25 ár, og tað er altíð eitt sera stuttligt og hugnaligt kvøld.

*Hvat etir tú til døgurða á jólum?*
Jólaaftan eta vit dunnu og tað, sum hoyrir til, og vanligan mandlugreyt. Annars í døgunum, sum koma, eta vit ræst kjøt og annað gott, sum hoyrir jólunum til.

*Hvat er tað besta við jólum?*
Tað besta má vera orsøkin, hví vit halda jól. At øll okkara stákan og ljós og gávur er ein háttur at vísa yvir á Jesusbarnið, sum var føtt ávíst ár í Bethlehem, men sum ikki var verandi í krubbuni, sum vit kanska halda, tá jólini eru farin framvið, men Hann vaks upp til mans og fullførdi sín gerning.
Annars – so havi eg altíð hildið at dagarnir millum jóla og nýggjár eru nakrir góðir dagar. Øll taka sær av løttum, man kann sita í frið og náðum og lesa eina góða bók, gera okkurt eyka gott til matna, spáka ein túr, hava gestir.

*Hvat er minni gott við jólum?*
Á jólum halda vit, at alt má vera gott – barnanna veitsla – at øll nú mugu vera glað og trygg. So tað er ein stór andsøgn, um foreldur ikki megna at skapa tryggar og góðar karmar fyri einum barni av t.d. rúsdrekka ella aðrari illstøðu. Børn hava onki alternativ, ongan valmøguleika, tey eru prísgivin til síni foreldur.

*Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?*
Nei, tað eigi eg á.

*Hvønn jólatónleik dámar tær best?*
Allan jólatónleikin sum hann er – bert ikki norskt/svenskt country.

*Hvat ynskir tú tær í jólagávu?*
Tað man ikki vera tað stóra – heldur ynski eg mær, at tey sum eg elski hava frið og eru glað og nøgd og sama ynski eg fyri øll onnur. Tá hava vit jól!




















